Góðu foreldur at børnunum í 3.b ☺

Tað var gott at síggja øll aftur aftaná summarfrítíðina. Vit eru so smátt við at vera komin í gongd aftur.

Mjólkaseðlar komu í taskuna í síðstu viku. Sendið børnini aftur í skúla við seðlinum undirskrivaðum, um tit keypa mjólk. Um tit ikki hava printara, kunnu tit skriva á seðilin nær tit hava gjørt flytingina.

Lús er í flokkinum, so kembið væl og ofta https://www.gigni.fo/skulaborn/umfarssjukur/lus/

Tað hevði verið orduliga gott, um tit kundu bundið bøkurnar inn í pappír við navni á. Allar uttan einnýtisbøkurnar (tað, ið vit skriva í).

Vit fara at hava felags foreldrafund mikudagin 06.09 kl 17.00. Vit byrja í Miðrók og fara so í flokshølini.

Hugnakvøld:
Sum nakað nýtt, fara vit at hava eitt hugnakvøld fyri gentunum í 3.a og b og eitt fyri dreingjunum í 3.a og b. Hugnakvøldið hjá gentunum verður mikukv. 30. aug kl 17.00 - 19.30, og tað hjá dreingjunum verður hóskv. 31.aug 17.00- 19.30.
Øll verða biðin um at taka ein rætt við, sum er nokk til viðkomandi og eitt sindur afturat. So verður sjálvtøkuborð við øllum rættunum. Vit keypa tallerkar, koppar og saft.

Tað verður eitt lesiátak um eina viku ella tvær. Fylgið við á vikuætlanini ☺

Vinaliga

Sigrid og Annika